## Spíla seg út á jóansøku

Handlarnir á Tvøroyri ætla rættiliga at spíla seg út á jóansøku. Í hesum sambandi halda teir Stevnunátt fríggjakvøldið á Jóansøku, og tá hava handlarnir opið til á midnátt við nógvum góðum tilboðum. Klokkan 18 vitjar Bassi hjá Eik og Oddi hjá Suðuroyar Sparikassa í miðbýnum, og klokkan 22 verður mótaframsýning uttanfyri Trilluna, har dansigentur eisini seta dám á. Tað er handilsfelagið á Tvøroyri, ið skipar fyri. Felagið heldur, at tað hendir ov lítið í handilslívinum og tí vilja tey royna okkurt nýtt. Fær tiltakið undirtøku, er ætlanin, at tað skal fylgja jóansøkuni bæði á Tvøroyri og í Vági.



## Avdúka Poul F sunnudagin

Sunnudagin klokkan 15 verður minnisvarði yvir kenda skaldið, Poul F., avdúkaður í Froðba. Tað er lions Klubburin í Suðuroy, sum hevur tikið stig til at reisa hetta minnið um eitt av okkara gitnastu skaldum við Tarvafjósið á Hamri í Froðba. Talan er um ein stein, sum er tikin úr haganum í Sumba við vælvild frá eigarunum. Hóast Poul F. er sumbingur, búði hann tey mestu av sínum manndómsárum í Froðba, har hann eisini var lærari. Tað verður Vilborg Mikkelsen, dóttir Poul F., sum fer at avdúka steinin, og Óli Holm fer at siga nøkur fá orð um skaldið. Somuleiðis fer Kirkjukórið, Ljómur at syngja.

# Føroyskar barnafamiljur vinka milliónum farvæl

**Í fjør rindaðu løntakarar í Føroyum nógvar pengar í barsilsskipanina, sum ikki komu barnafamiljunum til góðar**

BARSILSSKIPAN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Føroyskar barnafamiljur máttu í fjør vinka farvæl til 8,6 milliónir.

Tað vísir eitt yvirlit yvir fíggjarligu støðuna hjá Barsilsskipanini í fjør.

Hvørja ferð, vit fáa løn, stendur hvørja svart á hvítum á lønarseðlinum, hvussu stór upphædd verður goldin til barsilsskipanina.

Tað merkir, at hvørja ferð, vit fáa løn, er ein ávís upphædd markað beinleiðis til at gera tilveruna lættari hjá foreldrum við pinkubørnum.

Men ein trivaligan part av hesum pengunum síggja foreldrini als onki til.

Ein uppgerð yvir fíggjarligu støðuna hjá barsilsskipanini, vísir, at í fjør vórðu 74,4 milliónir játtaðar á fíggjarlógini til barsilsskipanina til at gjalda til foreldur í barnsburðarfarloyvi og til umsiting.



*Barsilsskipanin er góð forrætning hjá landskassanum, tí barnafamiljurnar síggja onki til ein fittan part av pengunum, sum tær av røttum eiga*

Men tað blivu bara brúktar 71,8 milliónir, so skipanin hevði eitt avlop upp á 2,6 milliónir, sum fullu beinleiðis aftur í stóra pott hjá landskassanum.

Gjaldið til barsilsskipanina er eitt ávíst prosentgjald av hvørjari løn og játtanin á fíggjarlógini verður ásett eftir, hvussu nógv, landsstýrið væntar, fer at verða goldið í lønum tað árið.

Men í fjør gekk munandi betri enn væntað og av tí sama vóru lønarútgjaldingarnar eisini munandi størri enn væntað.

Sostatt hava vit fingið váttað frá Tolli og Skatti, at í fjør vórðu tilsamans 80,4 milliónir goldnar inn í barsilsskipanina.

Sostatt vísir samlaða roknistykkiðhjábarsilsskipanini fyri í fjør, at tilsamans vóru 8,6 milliónir meiri goldnar inn í skipanina, enn tað vórðu goldnar útaftur til foreldur í barnsburðarfarloyvi.

Av av tí, at barsilsskipanin er ein stovnur undir landinum, fellur peningurin aftur til landskassan.

So hóast tað stendur í hvørjum einasta lønarseðili, at ein ávís upphædd er goldin til barsilsskipanina, er altso ein partur endaður beint aftur í landskassanum sum vanligur skattur og kann verða brúktur til onnur endamál.

Sostatt hava allir føroyingar í fjør goldið 12% ov nógv í barsilsskipanina, sum ikki komu barnafamiljunum til góðar, hóast peningurin beinleiðis er markaður til tær.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, fekk ikki sagt nakað um støðuna, fyrrenn hann hevði sett seg betri inn í viðurskiftini og tað eydnaðist av tí sama ikki at fáa viðmerkingar frá honum til dagsins blað.

### Barsilskipanin í 2006

| | |
|---|---|
| Goldið til skipanina | 80,4 milliónir |
| Játtað á fíggjarlógini | 74,4 milliónir |
| Brúkt | 71,8 milliónir |

Tølini vísa, at í 2006, vórðu 2,6 milliónir minni brúktar úr barsilsskipanini, enn játtað varð á fíggjarlógini og tær fara beinleiðis aftur í landskassan. Samstundis vórðu 80,4 milliónir goldnar inn í til barsilsskipanina. Sostatt hevði barsilsskipanin í fjør eitt avlop upp á 8,6 milliónir, sum fella aftur í landskassan.

Hetta merkir eisini, at allir løntakarar hava goldið 8,6 milliónir í barsilsskipanina, sum ikki eru brúktar til endamálið, men sum enda í landskassanum